UTTAN ÚR HEIMI

## Koyrdi olju í havið

Norska reiðaríið Høegh Fleet Services skal gjalda góðar 20 milliónir krónur í bót, tí eitt av skipunum hjá reiðarínum pumpaði olju í havið, meðan tað sigldi í Kyrrahavinum.

Amerikanska ákæruvaldið tók málið upp, eftir at ein av manningini á "Høegh Minerva" hevði boðað myndugleikunum frá, at skipið hevði koyrt olju í havið. Nú hevur ein dómstólur í statinum Washington við amerikonsku kyrrahavsstrondina gjørt av, at reiðaríið skal gjalda góðar 20 milliónir krónur í bót, og at annar stýrimaður, sum hevði vakt, tá oljan varð latin í havið, skal sita 30 dagar í fongsli.

Maðurin, sum boðaði amerikonsku myndugleikunum frá tí, sum hent var, gjørdi harafturímóti kvetti, tí sum tann fyrsti í USA nakrantíð hevur hann fingið samsýning fyri at boða frá slíkari dálking. Sambært blaðnum Seattle Post fær hann næstan tvær milliónir krónur í samsýning.

## Verður tikin skjótt

Nú er líkt til, at tann eftirlýsti krígsbrotsmaðurin Radovan Karadzic verður tikin um stutta tíð.

Karadzic er skuldsettur fyri krígsbrotsverk undir borgarakrígnum í Bosnia í nítiárunum. Krígsbrotsmannadómstólurin í Haag hevur biðið um at fá ahann útflýggjaðan, men hóast NATO-hermenn hava leitað eftir honum í fleiri ár, er hann ikki funnin enn. Herfyri mundu hermenninir tikið hann, men tað eydnaðist honum at sleppa til rýmingar. Hildið verður, at serbiskir embætismenn, sum hava arbeitt fyri ST, hava hjálpt honum at fjala seg. Teir hava nú fingið sekkin, og tí væntar høvuðsákærin hjá krígsbrotsmannadómstólinum, Carla Ponti, at Karadzic verður tikin skjótt.

Ein annar krígsbrotsmaður fjalir seg eisini í Bosnia. Tað er generalurin Ratko Mladic. Krígsbrotsmannadómstólurin hevur kravt at fáa hann útflýggjaðan, og NATO-hermenninir leita eisini eftir honum.

## Doyggja í stallinum

Teir donsku svínabøndurnir ala altsamt fleiri og fleiri svín, men nú vísa tøl eisini, at altsamt fleiri og fleiri svín doyggja í stallinum.

Tey nýggju tølini avdúka, at talið á svínum, sum doyggja í stallinum, er veksandi. Fyri fimm árum síðani doyðu 19,6 prosent av øllum svínunum í stallinum, men nú er talið komið upp á 21,5 prosent. Tað eru serliga tey smáu svínini, sum doyggja í stallinum, men nógv vaksin svín líða somu lagnu.

Í Danmark verður hildið, at alt ov nógv smá svín doyggja, tí bøndurnir hava lagt seg eftir at fáa so nógv svín undan hvørjari súgv sum gjørligt fyri at fáa meiri pening burturúr. Peter Sandøe, professari á Landbúnaðarháskúlanum, sigur við Jyllandspostin, at bøndurnir hava ov lítla virðing fyri djórunum, tá teir royna at fáa so nógv burtur úr hvørjari súgv gjørligt fyri at fáa sum mest av pengum burturúr.

## Streymtrot í Kina

Maskinurnar á nógvum kinesiskum verksmiðjum standa javnan stillar, tí tær fáa ongan streym, skrivar tíðarritið Business Week.

Ein talsmaður hjá vinnulívinum sigur við tíðarritið, at í summar fara ímillum 30 og 35 milliónir kilowattímar at resta í, og tað er nógv meiri enn seinasta summar, sigur hann. Streymtrotið ger, at verksmiðjur í 24 landspørtum standa stillar bæði ein og tveir dagar um vikuna.

Kina hevur havt sera stóran búskaparvøkstur tey seinastu árini, og tað er helst orsøkin til, at elverkini megna ikki at nøkta tørvin. Eitt annað er, at tey seinastu árini eru alt fleiri kinesarar fluttir inn í býirnar at búgva, og tað hevur eisini økt um streymnýtsluna. Ein triði trupulleiki er, at jarnbreytarkervið er ikki ført fyri at flyta alt kolið, sum orkuverkini brúka. Umleið tveir triðingar av kinesisku elorkuni eru frá kolverkum.

# Belgia aftur skakað av barnamorðum



*Michel Fourniret hevur viðgingið, at hann burturflutti, neyðtók og myrdi seks gentur. Kona hansara sigur, at hann hevur myrt minst níggju ungar gentur*

**Júst sum rættarmálið ímóti barnadrápsmanninum Marc Dutroux er av, skakar eitt nýtt mál um barnamorð Belgia**

BARNAMORÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Belgia hevur fingið ein Marc Dutroux afturat.

Bara fáar dagar eftir at tann herviligi barnadrápsmaðurin hevði fingið lívlanga fongsulsrevsing, viðgongur ein skóhøggari, at hann hevur gjørt av við seks gentur í Belgia og Fraklandi.

Tann 62 ára gamli Michel Fourniret viðgekk í rættinum, at hann beindi fyri teimum seks gentunum í árunum frá 1987 til 2001. Ein teirra var tann 12 ára gamla Elisabeth Brichet. Hon hvarv í belgiska býnum Namur í 1989. Pápi hennara sigur við belgiska sjónvarpið, at gentan bleiv burturflutt, neyðtikin og myrd, og at drápsmaðurin síðani hevði jarðað líkið.

– Nú vil eg hava sannleikan, segði Francis Brichet.

### Níggju gentur

Í áttatiárunum bleiv Michel Fourniret dømdur sjey ára fongsul í Fraklandi fyri at hava neyðtikið eina sjey ára gamla gentu. Tvey ár aftan á dómin bleiv hann latin leysur, og hann og familjan gjørdu av at flyta til Belgia at búgva. Belgiska sjónvarpið vil vera við, at hann neyðtók eina 12 ára gamla gentu longu tveir dagar eftir, at hann var sloppin úr fongslinum.

Í juli í fjør tók belgiska løgreglan Michel Fourniret. Hann bleiv skuldsettur fyri at hava burturflutt og misnýtt eina gentu. Hann hevði havt gentuna í einum vøruvogni, men tað eydnaðist henni at flýggja. Í fjør vórðu líkini av tveimum gentum funnin í einum skógi í Belgia nærhendis franska markinum, og illgruni hevur alla tíðina verið um, at Michel Fourniret hevði beint fyri teimum.

Kona hansara skal sambært belgiskum fjølmiðlum hava sagt, at maður hennara hevur beint fyri minst níggju gentum.

# Ísrael skal flyta múrin

**Ísraelski hægstirættur sigur, at stjórnin skal flyta múrin, sum skal forða palestinskum sjálvmorðsbumbumonnum at søkja at málum í Ísrael.**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Avgerðin hjá hægstarætti ber í sær, at myndugleikarnir mugu flyta einar 40 kilometrar av múrinum í útnyrðing úr Jerusalem, og verjumálaráðið kunngjørdi í gjár, at tað fer at laga seg eftir úrskurðinum hjá hægstarætti.

Ísraelsku myndugleikarnir hava gjørt av at byggja eina 680 kilometrar langa girðing fram við Vestara Áarbakka fyri at forða palestinskum sjálvmorðsbumbumonnum atsleppa til Ísraels. Ein partur av girðingini er píkatráður, men aðrastaðni hava myndugleikarnir bygt ein høgan múr. Palestinar og myndugleikarnir í fleiri londum hava funnist at girðingini, serliga tí at í støðum er girðingin langt inni á palestinskum øki.

Altjóða dómstólurin í Haag skal taka støðu til girðingina, og avgerðin hjá ísraelska hægstarætti verður tikin sum eitt fráboðan um, hvørja avgerð dómstólurin í Haag fer at taka.

Hinvegin hevur tað størri týdning, hvat hægstirættur í Ísrael sigur, tí úrskurðir hansara eru bindandi fyri stjórnina. Tey, sum hava kært avgerðina um at byggja girðingina, eru eisini væl nøgd við úrskurðin hjá hægstarætti. Tey vænta, at rætturin fer eisini at geva stjórnini boð um at flyta aðrar partar av girðingini.

Palestinar eru harafturímóti ikki nøgdir við, at girðingin við Jerusalem skal flytast. Palestinski forsætisráðharrin, Ahmed Qurie, segði í gjár, at øll girðingin skal takast niður.



UTTAN ÚR HEIMI



*Hesir seks kunnu vænta sær harða revsing. Ovast frá vinstru: Saddam Hussein, fyrrverandi forseti, Tariq Aziz, fyrrverandi uttanríkisráðharri og varaforsætisráðharri, Ali Hassan al-Majid, fyrrverandi generalur (betur kendur undir navninum "Kemiski Ali"), Aziz Salih Numan, fyrrverandi guvernørur hjá Baath-flokkinum, Barzan Ibrahim Hassan al-Tikriti, hálvbeiggi og fyrrvernadi ráðgevi Saddams og Abil Hamid Mahmud al-Tikriti, fyrrverandi skrivari hjá Saddam Hussein*

# Nú skal rokningin gerast upp

**Í gjár vórðu Saddam Hussein og fleiri av hansara næstu monnum ákærdir fyri krígsbrotsverk og brotsverk ímóti mannaættini. Men hvørja revsing skulu teir fáa? Skal Saddam dømast til deyða og avrættast?**

UPPGERÐ
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tað mundi kennast sum tann øvugta verð hjá Saddam Hussein og fremstu monnum hansara, tá teir í gjár komu fyri ein dómara og fingu at vita, at teir verða rættarsøktir fyri sumt av tí, sum teir gjørdu, meðan teir høvdu valdið í Irak. Tað mundi eisini kennast sum tann øvugta verð hjá teimum nógvu irakunum, sum í sjónvarpinum sóu fyrrverandi einaræðisharran og fremstu menn hansara sita á ákærubonkinum.

Millum ákærurnar vóru sum væntað tey grovastu brotsverkini, sum finnast í altjóða lóggávu: krígsbrotsverk, fólkamorð og brotsverk ímóti mannaættini, og fáur man vera í iva um, at í hvussu er Saddam er sekur í øllum ákærunum.

Irakska fyribilsstjórnin hevur gjørt av, at ein serdómstólur skal døma Saddam og menn hansara. Samstundis bleiv fráboðað, at dómstólurin hevur heimild til at døma teir ákærdu til deyða - eini boð, sum ivaleyst fullu í góða jørð í Washington. George W. Bush, forseti, hevur fyrr sagt, at taðeru irakar, sum avgera lagnu Saddams, og at sjálvur hevði hann einki havt ímóti, um úrslitið verður deyðadómur.

Evropasamveldið fer harafturímóti at kunna stjórnina í Bagdad um, at Evropa er ímóti deyðarevsing, sama hvat Saddam ella hinir ellivu verða funnir sekur í at hava havt ábyrgdina av. Talsmenn hjá ES hava sagt seg stúra fyri, at verður tann gamli irakski leiðarin avrættaður, fer tað uttan iva at økja illveljan ímóti Vesturheiminum. Rætt er tað, at irakar skulu døma hann, men tað var Vesturheimurin, sum feldi hann og lat hann upp í hendurnar á dómarunum.

Tað eru kortini ikki øll, sum vænta, at Evropa fer at seta seg upp á bakbeinini, verður Saddam Hussein dømdur til deyða og avrættaður. Fransmaðurin Guillaume Parmentier, sum er serkønur í altjóða viðurskiftum, segði nú um dagarnar, at hann væntar ikki, at tey evropeisku mótmælini verða serliga hvassorðað, verður Saddam dømdur frá lívinum. Maðurin hevur jú beint fyri túsundtals irakum, legði hann afturat.

Ein meiriluti av irakska fólkinum er sambært einari meiningakanning fyri at døma tann gamla einaræðisharran til deyða. 61 prosent av teimum spurdu søgdu seg taka undir við deyðarevsing, verður hann funnin sekur. Fimti hvør helt, at Saddam eigur at fáa lívlangt fongsul.

So eru tað tey, sum ivast í, hvussu rættvís rættarviðgerðin í Bagdad verður, og tí hava fleiri kravt, at alt málið verður sent beinleiðis í útvarpi og sjónvarpi, so tann mentaði heimurin kann tryggja sær, at alt fer rættvíst fram. Millum teirra, sum krevja fullan opinleika, er danski fólkarættarserfrøðingurin Ole Espersen.

– Tað er ikki nóg mikið, at rættarviðgerðin kanska verður tikin upp á film og síðani snøggað, áðrenn hon seinni verður send í sjónvarpi, segði hann við Ritzau í gjár. Sjálvur ivast hann ikki í, at Saddam fær harða revsing og kanska deyðadóm.

Men tað fáa vit ikki at vita enn á sinni. Sjálvt rættarmálið byrjar ikki fyrr enn næsta ár, og sambært teimum serkønu mugu vit bíða í fleiri mánaðir og kanska ár eftir dóminum.